# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit mugu skilja, at støðan er álvarssom, og at tað hevur skund at senda hermenn til Afghanistan (Barrack Obama)*

# Radovan Karadzic tikin

**Í 10 ár hevur fyrrverandi bosniaserbiski leiðarin Radovan Karadzic fjalt seg, men nú er hann tikin. Ætlandi verður hann latin krígsbrotsmannadómstólinum í Haag og ákærdur fyri fólkamorð**



*Radovan Karadzic*

Tíðindini um, at Radovan Karadzic er tikin, fingu góða móttøku:

- Hetta er ein stórur fyrimunur fyri Serbia, nú landið ætlar at fáa limaskap í ES, segði kommiserurin Olli Rehn, sum stendur fyri samráðingunum við lond, sum vilja sleppa upp í samveldið.

- Tað er gleðiligt, at hann er tikin, og eg vænti, at hann verður sendur til Haag, so hann kann verða revsaður fyri sínar illgerðir, segði norski uttanríkisráðharrin, Jonas Gahr Støre, tá hann frætti um handtøkuna í Beograd.

Serbiska stjórnin váttaði í gjárkvøldið, at trygdartænastan hevði tikið Karadzic. Tað er eitt sindur ógreitt, nær og hvar hann varð tikin, men sambært verja sínum bleiv hann tikin longu fríggjakvøldið.

Radovan Karadzic var leiðari fyri teimum bosnisku serbunum undir borgarakrígnum í Bosnia frá 1992 til 1995, og síðani 1998 hevur hann fjalt seg. Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur ákært hann fyri fólkamorð og onnur krígsbrotsverk. Eitt nú er hann ákærdur fyri at hava havt ábyrgdina av hersetingini av Sarajevo, sum kostaði 12.000 mannalív, og hann er eisini ákærdur fyri at hava havt ábyrgdina av hópmorðinum í Srebrenica, har 8.000 menn og dreingir vórðu myrdir.

## Stóran týdning

Serbia hevur verið undir stórum trýsti frá ES, sum hevur kravt, at myndugleikarnir skuldu handtaka Radovan Karadzic og bosniaserbiska generalin Ratko Mladic. Í Haag var eisini stór frøi, tá tað fræhttist, at Karadzic var tikin.

- Eg fekk boð frá mínum starvsfeløgum í Beograd um, at Karadzic var tikin. Vegna dómstólin skal eg ynskja serbisku myndugleikunum tillukku við einum væl eydnaðum átaki, segði Serge Brammertz, sum er høvuðsákæri í krígsbrotsmannadómstólinum fyri gamla Jugoslavia. Hann legði afturat, at handtøkan hevur stóran týdning fyri tey, sum liðu undir illgerðunum hjá Karadzic:

- Men handtøkan hevur eisini stóran týdning fyri altjóða rættvísið, tí hetta vísir, at eingin kann fjala seg so væl, at lógarinnar armur ikki kann røkka honum. Øll, sum flýggja og fjala seg, verða funnin, segði Serge Brammertz við AP-tíðindastovuna.

# Drápsmaðurin hjá Englu bað um umbering

**Anders Eklund bað í gjár um umbering fyri, at hann myrdi Englu Høglund og Pernille Hellgren**



*Anders Eklund í rættinum í Stockholm*

Mynd: Expressen

Í gjár byrjaði rættarmálið ímóti Anders Eklund, sum hevur viðgingið, at hann neyðtók og myrdi ta 10 ára gomlu Englu Høglund fyrr í ár, og at hann myrdi ta 31 ára gomlu Pernille Hellgren fyri átta árum síðani.

Ákæruvaldið vildi vera við, at hann neyðtók Pernille Hellgren, áðrenn hann myrdi hana, men tað hevur Anders Eklund avsannað. Til í gjár. Eftir at ákærin hevði avhoyrt hann í næstan ein tíma, kláraði Anders Eklund ikki meiri.

- Tað er rætt, at eg neyðtók hana. Men eg ætlaði ikki, at hon skuldi doyggja, og eg biði um umbering fyri tað, segði tann 42 ára gamli lastbilførarin og vendi sær ímóti mammu Pernille Hellgren.

Blaðið Expressen skrivar, at Anders Eklund hevur skrivað einari vinkonu eitt brævt, meðan hann hevur sitið í varðhaldinum. Í brævinum skrivar hann millum annað, at hann iðrar seg um illgerðir sínar. Verji hansara heldur uppá, at tann ákærdi er sinnissjúkur.

## STUTT SAGT

### Málið steðgað

Portugisiska løgreglan fekk í gjár boð um at steðga kanningunum í sambandi við tilburðin, tá Madeleine McCann hvarv úr einari íbúð í portugisiska frítíðarstaðnum Praia de Luz tann 3. mai í fjør. Tað var Fernando Jose Pinto Montero, løgmálaráðharri, sum gav løgregluni tey endaligu boðini. Hann gjørdi samstundis greitt, at portugisisku myndugleikarnir hava slept øllum skuldsetingum ímóti foreldrunum hjá Madeleine McCann, Kate og Gerry McCann, og bretanum Robert Murat, sum hevur verið settur í samband við málið. Foreldrini hjá teirri horvnu gentuni hava fyrr sagt, at tey fara at halda fram við sínum kanningum fyri at fáa loyst gátuna.



*Kate og Gerry McCann*

Mynd: AP

### Mótmæltu Sarkozy

Fleiri hundrað fólk komu í gjár saman í írska høvuðsstaðnum Dublin at mótmæla, at franski forsetin, Nicolas Sarkozy, var komin hagar. Frakland hevur í løtuni formansskapin í ES, og nógvir írar tulka vitjanina hjá franska forsetanum sum eina roynd at leggja trýst á írar fyri at fáa teir at góðtaka Lissabon-sáttmálan, sum írar vrakaðu á fólkaatkvøðu herfyri. Tá Sarkozy kom til stjórnarhúsini at tosa við Brian Cowen, forsætisráðharra, róptu mótmælisfólk „Nei er nei". Sjálvur hevur Sarkozy sagt, at hann ætlar sær ikki at ávirka írar, men at hann ætlar sær at lurta eftir teimum.



*Nicolas Sarkozy, forseti*

Mynd: Polfoto